# HEILSANIR





**Góða omman í Sumba**
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum 16. mai.
**Heilsan Súsanna og Adrian**
P.S. Her liggja vit ordiliga væl!



**Góða, fitta Anja**
Hjartaliga tillukku á 13 ára føðingardegnum 17. mai.
**Heilsan mamma og Gudmundur**



Hvør minnist ikki Pink Ladies úr filminum Grease??? Well, they're back & hendan hønan er pinkast av teimum øllum!!! Hon verður 28 fyrsta dagin, men still going pink! Hjartaliga tillukku! Muss muss



**Góða gumman!**
Henda fitta gumman verður 28 ár tann 18. mai og tí vilja vit ynskja henni hjartaliga tillukku við degnum. Vit vóna tú fært ein góðan dag … sjálvt um vit ikki koma suður. Øll góð ynski í framtíðini.
**Heilsan Judit og Rókur**



**Góða Hjørdis**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum ynskja mamma, **babba og Bjørk**





**Góðu mamma og mammubeiggi**
Hjartaliga tillukku við 45 ára døgunum tann 17. mai og alt tað besta í framtíðini ynskir
**Arna**



**Góði Hjørdis og Bjørk**
Hjartaliga tillukku, Hjørdis við 10 ára føðingardegnum tann 17. mai, og Bjørk við 2 ára føðingardegnum tann 3. apríl. Jesus signi lívsleið tykkara.
**Heilsan omma og abbi á Argjum**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum 18. mai. Vit gleða okkum til tú kemur aftur.
**Heilsan Gudmundur**



**Góði, fitti Jóhan**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 14. mai.
**Heilsan Adrian og Súsanna**



**Góða, fitta Lív**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum.
**Heilsan fastir**

**Góða Lena**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum 14.
**Kærar heilsanir mamma og babba**
Brynja fær eisini eina heilsan við degnum frá ommu og abba í Kaldbak





**Tvíburarnir Eyðvør og Eyðfinn**
Góðu tit bæði. Hjartaliga tillukku við teimum 90 tann 17. mai. Gud signi framtíð tykkara.
**Heilsan mamma og pápi**





**Góði Adrian og Jóhan**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, Adrian 1 ár 2. mai og Jóhan 2 ár 14. mai. Jesus pápi signi framtíð tykkara.
**Heilsan omman og abba-Kurt**

**Hey Júsinus!**
Hjartaliga tillukku við 19 ára degnum 14. mai.
Du er en dygtig lærling!
Heilsan **sveinurin**





# TILTØK

**Gudstænastur**
**5. sunnudagur e. páskir.**
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Christianskirkjan:* kl. 11,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Gøta:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Eiði:* kl. 10.40, skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
*Viðareiði:* kl. 12, Jóannis Fonsdal
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*kl. 20:* Kirkjukonsert (Kór Glyvra kirkju)
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Helgi Hróbjartsson
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri heidningamissiónina hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum
*Fuglafjørður:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Vestmanna:* kl. 11, Marjun Bæk
*Haldarsvík:* kl. 11, altarg., Mogens T. Christensen
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Hvítanes:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Kollafjørður:* kl. 11 Inga Poulsen Dam
*Sandvík:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Rasmussen

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardagin kl. 11 Útifundur við Handilskjarnan um viðrar. Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Toril og Niels E. Olsen, kl. 14 Sunnudagsskúli, Bøn kl. 17.30, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**á Fløtum**
*Landavegur 98*
Bíbliugransking við Pætur M. Hansen verður mánakvøldið kl. 20, evnið: Galatiabrævið. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og samstundis Møti. Øll eru vælkomin. www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman v/ Jóanes Fonsdal presti. Evnið: Ámos profetur.

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Absalon Áargarð um evnið »Stóri vinningurin« og á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Zachariassen um »Hvat sigur bíblian um at geva« (2. partur). Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbiltími, undirvísing um Opinberingina.
www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið er »At lata seg fylla av Heilaga Andanum«. 2 partur við Ólavur Jacobsen, kl. 16 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti saman við evangeliihúsinum, Meinigheitini í Hoyvík Rhema í Hoyvík.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 Evangel. møti v/ suðuroyingum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17 Evangel. møti v/ suðuroyingum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Andrzej Wydrzynski, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, ommu og abba dagur, kl. 18 Útimissiónsmøti v/ Snorra Brend, Meinigheitskórið syngur. Burturluting í kjallaranum aftaná.

**Samkoman Rhema**
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin møti og sunnudagsskúli. Eisini verður biðið fyri sjúkum á møtinum.
www.rhema.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við luttøku av Argjum.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting v/ Jóhan Hendrik Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin í Saron.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Arna Abrahamsen. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Thomas Dam talar. Streingjakórið og ungdómur syngja. Ársgávan til Heimamissiónina verður handað. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**KFUM og K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Felagsmøti við Ludvig Nessai í Christianskirkjuni,
kl. 21 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti við Sannu Hammer. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna felagsmøti í Christianskirkjuni.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- & lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sands Missiónshús**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Mennirnir fara at syngja. Tú ert vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í Cafe One Way leygardagin 15. mai kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Tom og Katrinu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Palli Petersen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Malta í DK**
Leygarkvøldið 15. mai kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 16. mai kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar eru Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyahúsið**
Fríggjakvøldið 21. mai kl. 20.30 hevur Kristnastova fríggjakvøldsmøti í Føroyahúsinum. Jógvan Jacobsen talar. Vitnisburður. Nógvur góður og léttur felagssangur við sera góðum tónleikarum og sangarum. Ókeypis te/kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kristnastova**
Fríggjakvøldið 21. mai er fríggjakvøldsmøti ikki í Kristnastovu, men í staðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 17. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum.
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudag, tlf. 316491
**Túrur til Eiðis 26. mai kl. 10.00 úr Steinatúni, vitja verður glassmiðjuna hjá Elisabeth og Páll Ellingsgaard, síðani verður døgurði í Lonini. Aftur í Havn uml. kl. 16.00. Kostnaður 150,- gjaldast áðrenn kl. 12.00 24. mai**
***Týsdagur 18. mai***
kl. 10-11.30 Vit syngja saman við løgtingslimum, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Myndir á stórskíggja frá túrinum í Kalsoynni
***Mikudagur 19. mai***
kl. 10-12 Handverk. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur niðan Listaskálan – vit ganga fram við ánni í Viðarlundini
***Hósdagur 20. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 21. mai***
kl. 10-12 Handverk, øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Leygardagin 15. mai verður gongutúrur í samband við Bátastevnuna í Vestmanna. Gingið verður úr Saksunardali til Vestmanna. Miðal tungur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Leygardagin 15. mai verður gongutúrur: Røðin Skeiðskarð-Skælingsfjall (Kommunumarkið). Farið verður av Kunningarstovuni kl. 16.00. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Torførur túrur. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 16. mai. Gingið verður úr Tórshavn til Kirkjubø. Vit møtast uppi á Hamaranum á Argjum kl. 14.00. Bette Johansen er ferðaleiðari. Túrurin er miðal. Tilmelding ikki neyðug.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 15. mai, Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 16. mai, Runavík tlf. 44 80 16

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Er Gud við okkum, hvør er tá ímóti okkum?*
*Róm. 8,31*

Gud er við okkum, hvar vit enn ferðast. Hann fer ikki frá okkum hvørki í neyð, mótburði, vanda ella deyða.

Hesin Gud okkara hevur skapað okkum og hann gevur okkum lívið, hvønn morgun, vit vakna. Og vit fáa lívið av nýggjum í syni hanara, Jesusi Kristi.

At trúgva er at tulka lív sítt út frá kærleikans og náðinnar Gudi. Tað er at taka ímóti lívinum hvønn dag sum eina gávu og sum eina uppgávu. Tað er at trúgva, elska og vóna í øllum førum og viðurskiftum.

At trúgva er at liva av náði. Tað er at vita, at lívið er gáva og vit eiga hesa gávu bert við at geva hana víðari til næstan í kærleika.

At liva sum kristin er at móttaka og geva. Tað er at móttaka kærleika og lív, og tað er at geva kærleika og lív til onnur. Alt hetta eiga vit sum kristin frá kærleikans Gudi. Og einki skal skilja okkum frá kærleikans Gudi.

Í lívi okkara eru tvørleikar, mótburður og vandar. Uttanum hetta sleppa vit ikki. Men í øllum førum og viðurskiftum eru vit sett at móttaka lívið og tað góða frá Gudi og geva tað víðari til næstan.

At liva sum kristin er at liva hóast tað ónda hóttir okkum og tað góða, sum er í heiminum. Og vit eru sum kristin sett at bera ein neista av rættvísi, kærleika og tí góða til tey menniskju, vit møta á lívsleið okkara, tað er sum trúarbøtari av rættvísi, kærleika og tí góða til tey menniskju, vit møta á lívsleið okkara.

Alt hetta eiga vit sum kristin í trúnni á tann góða Gud, sum er skapari og frelsari okkara. Og vit eiga alt hetta við at geva tað til onnur. Einki skal megna at skilja okkum frá hesum kærleikans Gudi.

Er Gud við okkum, hvør er tá ímóti okkum?

**David Johannesen, prestur**